ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Katrin Olsen wurde im Färöboot zweimal färöischer Meister*

*Wikipedia um Katrin Olsen*

# Katrin á Wikipedia

**Katrin Olsen eigur nú sína egnu slóð á Wikipedia. Og um vikuskiftið kann enn ein world-cup sigur møguliga leggjast afturat síðuni**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki sørt, at Katrin Olsen ger um seg innan rógvíítróttina. Somikið nógv hevur hon gjørt um seg, at ein lýsing av føroyska róðrakvinnuni nú er at finna á internet-alfrøðini, Wikipedia.

Á síðuni, sum er á týskum, stendur millum annað um fyrstu róðrarárini hjá Katrini umborð á Jarnbardi, og hvussu hon síðani fór undir altjóða kappróðurin, tá hon flutti til Danmarkar.

Síðani 2002 hevur Katrin róð við danska landsliðnum, og eru tað ikki minst úrslitini her, sum hava gjørt alheimin varugan við navn hennara.

Komandi vikuskiftið skal Katrin rógva enn eina World-Cup stevnu. Hesa ferð verður tað í Amsterdam, har 750 rógvarar úr 42 londum taka lut. Fyrstu World Cup stevnuna hetta kappingarárið vann Katrin í dupultum scullara saman við Juliane elander. Hesa ferð hevur landsliðsvenjarin gjørt av, at manningin hjá kvinnuliðnum skal blandast nakað øðrvísi, og tí rør Katrin saman við Sine Christiansen úr Hadsund. Vónin hesa ferð er, at danir fáa minst eina manning í finaluna, men talan verður um sterka mótstøðu. Eitt nú frá Kina, sum hevur fýra manningar við, meðan eisini Finnland, Pólland og Týskland hava sterkar manningar.




*Á slóðini, de.wikipedia.org/wiki/Katrin_Olsen, ber til at lesa um tað, sum Katrin Olsen higar til hevur avrikað innan kappróður*

## Frem í andróðri



Felagið hjá Atla Danielsen og Gunnari Nielsen, Frem, er í vanda fyri at fara á húsagang. Síðani teir fyrri 15 árum síðani fóru av knóranum, hevur felagið havt eina tunga tilveru, og í dag skrivar Ekstra Bladet, at felagið enn eina ferð er ávegis húsagangi.

Soleiðis fingu ognarar hjá felagnum í gjár bræv, har felagið fyri aðru ferð í trý ár biður um at gera eina akkord-skipan um skuld felagsins. Skal felagið hóra undan, er neyðugt, at ognarar avskrivað 80% av síni áogn í felagnum.

Ekstra Blaðið skrivar, at í brævinum, sum er sent, verður upplýst, at samlaða skuldin hjá felagnum er 21,6 milliónir. Samlaða ognin hjá felagnum er bara 3,1 millión. Tey 20%, sum felagið nú sigur seg kunna gjalda, koma frá nýggjum íleggjarum, men hesir eru so bara tøkir, um ognararnir eftirlíka ynskinum um akkord-skipan.

Stjórin í felagnum, Hans Hermansen, sigur við Ekstra-Bladet, at spælararnir fáa sína løn til tíðina, hóast fíggjarligu trupulleikarnar.

**-mørk**

# Christian fær nýggjan eigara

**Fyrrverandi thailendski forsetin, Thaksin Shinawatra, hevur boðið 900 milliónir krónur fyri Manchester City**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Verður Thaksin Shinawatra góðkendur av ensku Premier League, verður hann mest sannlíkt nýggjur eigari av Manchester City*

*Mynd: Polfoto/AP*

Manchester City hevur seinnu árini roynt at endurvunnið sætið sum eitt av fremstu feløgunum í enskum fótbólti. Ikki minst tey árini, tá Kevin Keegan var venjari, keypti felagið hópin av dýrum spælarum, men úrslitini gjørdust ikki tey heilt góðu kortini.

Og tað hevur kostað dýrt á botnlinjuni. Somikið dýrt, at felagið seinasta hálva árið hevur leitað eftir nýggjum íleggjarum, og nú tykist hesin vera funnin. Nevndin í felagnum hevur í øllum førum viðmælt aðalfundinum, at nýggi eigarin sleppur at keypa seg inn í felagið, har Christian R. Mouritsen og Adrian Cieslewicz teljast millum spælararnar í ungdómsrøðunum.

Shinawatra varð í fjør koyrdur frá sum thailendskur forseti eftir hernaðarkvett. Orsøkin handan hetta var korruptión, og síðani er ákæra reist móti Sinawatra um júst korruptíón.

Um tað eru svartir pengar, sum eru nýttir til keypið, ber illa til at staðfesta. Og júst hesin spurningurin er helst tann, sum vigar mest, tá aðalfundurin skal taka støðu til boðið. Eisini tí enska Premier League skal góðkenna nýggjan eigara av einum felag.

Rættarmálið, sum er reist móti Sinawatra og konu hansara, verður viðgjørt á rættarfundi í komandi mánaði.